STUTT SAGT

## Berlusconi spiltur út

Í Italia ger stjórnin hjá Romano Prodi, forsætisráðharra alt fyri at greiða fólki frá., hvussu nógv hon hevur at gera við at rudda eftir fyrrverandi stjórnina og serliga fyrrverandi forsætisráðharran Silvio Berlusconi.

Í samrøðu við blaðið La Republica sigur Prodi, at stjórnin noyðist at draga syndirnar hjá undanfarna forsætisráðharranum fram, so fólk kunnu skilja tey inntriv, sum nýggja stjórnin noyðist at fremja. Sambært Prodi er verður hallið á ársins fíggjarlóg nógv størri, enn hann hevði væntað, áðrenn hann tók við.

–Vit noyðast tí at spara, men fólk skulu vita, at tað er ikki okkara skyld, sigur Prodi við La Republica.

Tað er tó ikki hald í øllum atfinningunum hjá nýggju stjórnini. Fyri nøkrum døgum síðani skrivaði týska blaðið Die Zeit frá italskum stjórnarkeldum, at sambært einari frágreiðing er Italia tað ES-landið, sum ger minst fyri at verja umhvørvið, men hesum hevur ES víst aftur.

## Tann franska Hillary

Hevði forsetaval verið í Fraklandi nú, hevði landið ivaleyst fyri fyrstu ferð fingið eina kvinnu í embætið. Í hvussu er bendir alt á, at tann 52 ára gamla Ségoléne Royal er tann best umtókti politikarin í Fraklandi í løtuni, og hendir einki óvæntað, hevur hon góðar møguleikar at vinna forsetavalið, sum verður næsta ár.

Hóast eitt ár er eftir til valið, er valstríðið langt síðani byrjað, og Ségoléne Royal hevur tikið dystin upp við Nicolas Sarkozy, innanríkisráðharra, ið helst verður hennara harðasti kappingarneyti. Nógvir fransmenn samanbera hana við amerikonsku Hillary Clinton, ið tykist hava møguleikar at gerast fyrsta kvinnan í forsetaembætinum har, og tað eru tey, sum longu nú ímynda sær tær báðar við fundarborðið á einum G8-toppfundi í framtíðini. Eygleiðarar siga, at tær báðar minna ikki sørt um hvør aðra, og seinni í hesum mánaðinum hittast tær at tosa um felags áhugamál.

Ségoléne Royal er útbúgvin búskaparfrøðingur. Hon hevur sitið í franska tjóðartinginum síðani 1988 og hevur verið ráðharri tvey tíðarskeið. Hon er ógift, men livir saman við formanninum í sosialistaflokkinum, Francois Hollande, og tey eiga fýra børn.

## Hægri rentu og minni skatt

Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF heldur, at norðmenn eiga at rinda meiri rentu, men minni skatt av arbeiðslønini.

Robert Ford, sum er deildarleiðari í IMF, hevur júst verið í Noregi. Har hitti hann Kristin Halvorsen, fíggjarmálaráðharra, og aftan á fundin greiddi hann frá, at hann hevði givið henni tey ráð at hækka rentuna, at lækka skattin á arbeiðslønum og at tryggja, at norðmenn fáa nakað burtur úr teimum nógvu oljupengunum.

– Skatturin á arbeiðsinntøkum er sera høgur í Noregi. Ein lætti hevði verið tað rætta, og tað hevði eisini bøtt um kappingarførið hjá vinnulívinum, segði deildarleiðarin í IMF.

Men stjórnin í Oslo fer neyvan at lurta eftir tilmæli hansara. Talsmenn hjá stjórnini søgdu beinanvegin, at stjórnin heldur seg til tann politikk, sum hon hevur stungið út í kortið, og har er eingin skattalætti uppií.

## Yvirgangsmaður sleppur leysur

Í morgin hevur indonesiski yvirgangsmaðurin Abu Bakar Bashir sitið í fongsli teir 26 mánaðarnar, sum hann bleiv dømdur í sambandi við bumbuatsóknina á frítíðaroynni Bali á heysti í 2002.

Sambært tíðindastovunum vænta myndugleikarnir, at fleiri hundrað viðhaldsmenn hjá Bashir fara at taka ímóti honum, tá hann sleppur út um fongsulsmúrin.

Tey flestu halda, at Abu Bakar Bashir er leiðari í indonesiska yvirgangsfelagsskapinum Jemaah Islamiyah, men serfrøðingar í Djakarta vænta ikki, at felagsskapurin fer at taka atsóknirnar uppaftur, sjálvt um leiðarin sleppur leysur nú.

UTTAN ÚR HEIMI

# Florida bíðar eftir Alberto



*Alberto kemur inn yvir Florida í kvøld*

**Myndugleikarnir hava flutt fleiri túsund fólk burtur frá strondini, nú tann fyrsta tropiska ódnin í summar nærkast landi**

ÓDN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Jebb Bush, guvernørur, ætlar ikki at lata seg taka á bóli, nú ársins fyrsta tropiska ódn ber við land í Florida í kvøld. Hann hevur tí givið fólki boð um at fara burtur frá strondini og av nøkrum smáum oyggjum, og sambært løgregluni hava umleið 21.000 fólk fingið boð um at flyta.

Í gjár herjaði Alberto vestara part av Kuba. Vindferðin var upp í góðar 70 kilometrar um tíman, og tað regnaði av grimd, so stór øki standa undir í vatni. Amerikonsku veðurmanninir høvdu væntað, at vindurin fer at veksa, áðrenn Alberto ber við land í Florida, men í dag var líkt til, at vindurin var minkandi. Veðurmenninir stúra kortini meiri fyri tí óvanliga nógva regninum, sum Alberto hevur við sær.

Tað árliga tíðarskeiðið við tropiskum stormum og ódnum er frá juni til 30. november, og amerikanska veðurstovan segði herfyri, at hon væntar minst 13 ódnir í ár. Í fjør vóru ikki færri enn 28 ódnir skrásettar, og tað var met.

# Amerikanskir senatorar í hernað ímóti hvalaveiði

**21 amerikanskir senatorar ætla sær at fáa bann fyri allari vinnuligari hvalaveiði**

HVALAVEIÐI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fríggjadagin møtast tey 70 limalondini í altjóða hvalaveiðinevndini IWC á ásfund á karibisku oynni St. Kitst, og har fer Japan at royna at fáa undirtøku fyri, at landið kann økja sína hvalaveiði. Sum er veiðir Japan bara hval til vísindaligar rannsóknir, eins og íslendingar eisini gera. Noreg er tað einasta IWC-landið, sum hevur beinleiðis vinnuliga hvalaveiði.

Í fyrsta umfari ætla teir 21 senatorarnir at forða fyri, at Japan sleppur at økja sína hvalaveiði, men teir ætla sær eisini at steðga rannsóknarveiðini hjá íslendingum og japanum. Senatorarnir eru sannførdir um, at íslendingar og japanar brúka vísindaligu kanningarnar sum umbering, og at talan í veruleikanum er um vinnuliga hvalaveiði, skrivar AP.

– Tað er skeivt, at lond brúka vísindina sum jarnbrot fyri at sleppa at veiða hval. Altjóða samfelagið eigur at tryggja, at lond gevast at veiða djór, sum eru í vanda fyri at verða oydd, sigur demokratiski senatorurin Maria Cantwell við AP.

# Tekur við eftir al-Zarqawi

**Al-Qaeda hevur longu útnevnt eftirmannin hjá Abu Musab al-Zarqawi**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Maðurin, sum skal taka við eftir yvirgangsleiðaran í Irak, eitur Abu Hamza al-Muhajir. Tað bleiv kunngjørt á einari heimasíðu í gjár, og har varð lagt afturat, at hann varð valdur uttan atkvøðugreiðslu.

Tað er ikki nógv, serfrøðingar vita um tann nýggja mannin, men BBC veit frá álítandi keldum at siga, at al-Muhajir hevur drúgvar royndir í tí heilaga bardaganum hjá al-Qaeda ímóti Vesturheiminum. Eygleiðarar í Miðeystri vita harafturímóti at kalla einki um hann, og tað er tí ikki óhugsandi, at Abu Hamsa al-Muhajir er eitt dulnevni, siga teir. Í øllum førum var hetta navnið ikki ímillum teirra, sum sambært eygleiðarunum kundu væntast at taka við eftir al-Zarqawi.

Amerikanski herurin segði seg í gjár hava fingið endaliga vissu fyri, at tað var al-Zarqawi, sum doyði í einum bumbuálopi norðan fyri Bagdad í síðstu viku. Tað vístu DNA-royndir.